## Bummdagur á børsinum



Fleiri feløg minkaðu nógv í virði á íslendska virðisbrævamarknaðinum í dag. Dagurin í dag royndist illa hjá feløgunum, sum eru skrásett á partabrævamarknaðinum í Reykjavík. Fleiri feløg vóru fyri stórum falli, og tað størsta fallið hevði FL Group, hvørs partabrøv fullu 13,21 prosent í dag. Men onnur mistu eisini nógv virði. Eitt nú fullu partabrøvini í Exista 10,32 prosent. Í Íslandi hava tíðindi gingið um, at FL Group verður tikið av marknaðinum í Reykjavík í næstum. 23 feløg mistu virði á marknaðinum í Reykjavík í dag. Einki felag fór hinvegin.

## Páskatombola á Argjum

Skírisdag 20. mars kl. 14 verður stórt páskatombola í Róðrarneystinum á Argjum. Tað er Argja Bóltfelag, sum skipar fyri. Argja Bólfelag hevur í fleiri ár skipað fyri páskatombola, og hevur undirtøkan altíð verið ógvuliga góð. Vinningarnir eru m.a. matur og ein øgilig rúgva av páskareggum. Nakrir høvuðsvinningar eru sjálvandi eisini við, og eru tað flogferðaseðil, fartelefon og ein málningur. Argja Bóltfelag hevur fótbóltslið í nærum øllum deildum og er eitt sera virkið felag. Til tess at halda virkseminum í gongd, krevst sjálvandi nakað av fíggjarligari orku eisini. Tí skipar Argja Bóltfelag m.a. fyri páskatombola.

# Nýggi kranin hjá Faroe Ship eitur Greppur

**Navnið varð funnið í innanhýsis navnakapping hjá Faroe Ship, og var tað Silri M. Hentze, sum vann við uppskotinum Greppur, sum merkir risi**

FARMAVINNA

Í sambandi við at Faroe Ship hevur lagt tað mesta av virkseminum um til bingjuflutning, hevur felagið gjørt av at keypa ein nýggja krana av slagnum Gottwald 6407. Kranin vigar 415 tons og hevur 7 akslar og lyftir uml. 100 tons út á 24 m.

Umframt at handfara bingjur gevur kranin Faroe Ship møguleika at handfara størri bulklastir eisini.

Nýggi kranin er diesel elektroniskur og hevur sera lága diesel nýtslu. Hann er tann mest umhvørvisvinarligi kranin og hevur tað lagsta óljóðstøði sum finst á marknaðinum.

Nýggi kranin kemur at lætta um arbeiðsgongdina, trygdina eins og um tíðina at handfara góðsið. Fyri at gagnnýta møguleikanar á krananum til fulnar, má havnin styrkja kajkantin og dýpa havnina – hetta verður vónandi gjørt í framtíðini.

Kranin er framleiddur av Gottwald Port Technology í Dusseldorf. Gottwald er heimsins leiðandi framleiðari av "mobile harboure crane" og framleiddi 92 kranar í 2007.

Í sambandi við nýggja kranan er útskrivað innanhýsis navnakapping sum siðvenja er í samtakinum. Navnið bleiv avdúkað í gjár, og vinnarin av navnakappingini er Silri M. Hentze, sum arbeiðir í Faroe Express, við navninum Greppur.

Orðið Greppur verður nýtt í kvæði og merkir: risi ella kappi. Somuleiðis verður orðið at "greppa" javnan nýtt sum teldumál millum forritarar. At "greppa" merkir at fara inn í eina fílu og heinta út eitthvørt - eins og "Greppur" heintar bingjur...




# Mynstringin á Carlton brand-ólóglig

**Mynstringarlistin á Carlton er ólógligur, sigur formaðurin í Maskinmeistarafelagnum**

CARLTON

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er lítið skil á mynstringarlistanum hjá Carlton, nú hann er farin til fiskiskap.

Tað staðfestir Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum.

Við Rás2 í morgun staðfesti hann rætt og slætt, at mynstringarlistin er brand-ólógligur, sum hann tók til.

- Her hava vit eitt púrasta feskt dømi upp á eina brand-ólógliga mynstring, segði hann.



*Carlton er nokk ikki eindømi upp á eitt skip við einum brand-ólógligum mynstringarlista, heldur Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum*

Fyri tað fyrsta kom mynstringarlistin ikki undan kavi fyrrenn Carlton hevði verið til fiskiskap í eina viku.

Men tá ið hann so kemur undan kavi, samsvarar hann ikki við manningarlistan.

Eftir mynstringarlistanum eru ongir dekkarar við Carlton á hesum túrinum. Bara yvirmenn, fyrsti, annar, triði, fjórði stýrimaður, fleiri maskinmenn og ein kokkur.

Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum sigur, at summir av teimum, sum standa mynstraðir sum maskinmenn, hoyra heima aðrastaðni umborð enn í maskinrúminum.

Hann heldur ikki, at hetta er eindømi í okkara heimaflota.

- Tað vísir seg, at tað kunnu ganga rúm tíð, áðrenn mynstringarlistarnir koma fram til mynstringar myndugleikanum.

- Her eru fleiri viðurskifti, sum halta. Eitt er, at mynstringarmyndugleikin, sum eru sýslumenninir, hava ein trupulleika. Men eisini eftirlitsmyndugleikin, sum er skipaeftirlitið, hevur ein trupulleika, helt hann fyri á Rás2 í morgun

Páll Hansen heldur tí, at tað er neyðugt at taka hesi viðurskifti í nógv størri álvara.

Hann heldur, at vit eiga at dagføra mynstringarlógina og at skipa fyri eini talgildari mynstring, tí hann heldur, at tað kundi hjálpt munandi upp á trupulleikan.

Hann vónar at mynstringarlógin nú verður tikin upp til politiska viðgerð.

Í ringasta føri kunnu vit koma í ta støðu, at vit vita ikki, hvør er umborð á einum skipi í eini vandastøðu og tí hevur tað ómetaliga stóran týdning, at mynstringarlistin er fullfíggjaður.

Tað eydnaðist ikki Ras2 og Sosialinum at fáa eina viðmerking frá sýslumanninum í Klaksvík, áðrenn blaðið fór til prentingar.